Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Holm Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Tilflyting og uppihaldsskylda

Spurningar:

1. Hvussu og hví ætlar landsstýrismaðurin at broyta treytir í m.a. uppihaldsskylduni fyri at fáa familjusameining?
2. Hvørji rættindi hava fólk, sum koma til Føroya sum familjusameind?
3. Hvussu nógv familjusameiningsloyvi eru latin seinastu fimm árini, eisini býtt á aldursbólkar yngri og eldri enn 18 ár?
4. Hvussu nógvir útlendingar hava fingið varandi uppihaldsloyvi í Føroyum eftir at vera komin til Føroya sum familjusameind seinastu fimm árini?
5. Hvørjum øðrum átøkum arbeiðir landsstýrismaðurin við á útlendingaøkinum, og nær kann væntast, at hesi verða sett í verk?

Viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin nevndi í sjónvarpsviðtalu herfyri, at hann ætlar at endurskoða integratiónspolitikkin, har ímillum uppihaldsskylduna, fyri at fáa familjusameining. Fyri at fáa greiðu á, hvat landsstýrismaðurin sipaði til, verða hesir spurningar settir.

Gongdin er, at talið av útlendingum veksur støðugt, og fólkasamansetingin í Føroyum broytist spakuliga av tí sama. Við snarskipanini er eisini vorðið lættari hjá føroyskum vinnulívi at fáa fatur í útlendskari arbeiðsmegi. Um ársskiftið vóru í alt 2.634 útlendingar í Føroyum við øðrum ríkisborgaraskapi enn norðurlendskum. Tey flestu eru úr Filipsoyggjum (474), Póllandi (310), Rumenia (258) og Teilandi (165), sambært Hagstovuni.

Tað er greitt, at fleiri útlendingar, sum koma til Føroya í arbeiðsørindum, samstundis droyma um eina fastbúgvandi tilveru í Føroyum og um at fáa familjuna hendavegin at virka og liva.

Integratión er víðfevnd og samansett uppgáva, sum í høvuðsheitum snýr seg um at savna fleiri partar í eina eind. Sum samfelag hava Føroyar sett sær fyri, at integratiónspolitikkurin skal virka fyri, at útlendingar kunnu við sínum førleikum og samleika skapa sær eina tilveru her. Skal hetta eydnast, so skal føroyska samfelagið eisini skapa tilboð og seta ávís krøv, og uppihaldsskyldan er ein partur av tí.

Á Løgtingi, 15. juni 2023

Uni Holm Johannesen